## Neyðtók 32 kvinnur

Í Suðurkorea er ein maður, sum arbeiddi sum brúdleypsfyriskipari, dømdur fyri at hava neyðtikið ikki færri enn 32 kvinnur. Sambært Sky News hevur maðurin, sum er 45 ára gamal, fingið lívlanga fongsulsrevsing. Í ákæruritinum varð maðurin ákærdur fyri at hava gjørt seg inn á kvinnur, sum búðu einsamallar. Øll lógarbrotini hendu tíðliga um morgunin. Myndugleikarnir siga, at tað var torført at avdúka mannin, tí hann var sera varin og ansaði altíð eftir, at ongar DNA-royndir skuldu avdúka seg. Men eftir at løgreglan hevði hildið eygað við honum í 100 dagar, bleiv hann tikin.



## Útvarpsmaður myrdur

Í Bulgaria er ein kendur útvarpsmaður funnin myrdur í miðbýnum í høvuðsstaðnum Sofia. Tann 30 ára gamli Bobi Tsankov hevði fleiri útvarpssendingar um mafiavirksemið í Bulgaria, og hann hevur eisini skrivað bøkur um evnið. Myndugleikarnir siga, at ókendir menn skutu Bobi Tsankov, og at tveir lívverjar, sum fylgdust við honum, vórðu særdir. Hetta er ikki tað fyrsta morðið, sum bulgarska mafian er løgd undir at hava framt, men tað er ógvuliga sjáldan, at nakar verður dømdur. Tað hevur fingið ES at finnast hvassliga at bulgarska dómsvaldinum, skrivar Reuters.

# Meiri fiskur og støðugt arbeiði á flakavirkjunum

**Fáa flakavirkini stuðul til at innflyta frystan fisk til virkingar, hevði tað ført við sær, at rávørutilgingdin til fiskavirkini bleiv javnari og arbeiðið støðugari**

FISKAARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður endurgjaldsskipanin sett aftur í gildi, hevði tað kunna skapt arbeiði til fólk, sum í dag eru arbeiðsleys og tað hevði fingið lív aftur í virki, sum í dag standa still, ella í besta føri, hava óstøðugt arbeiði.

Tað staðfestur Símun P. Jacobsen á Føroya Fiskavirking.

Í grein í Sosialinum í gjár søgdu bæði hann og Jógvan Gregersen á Vaðhorn, at verður almennur stuðul aftur latin til at innflyta frystan fisk til virkingar, kundi tað skapt arbeiðið til eini 400 fólk og samstundis hevði tað ført til eina virðisøking í samfelagnum upp á 150-250 milliónir

Landið hevði sosttatt fingið stuðulin fleiri ferðir aftur, eru teir báðir samdir um.

### Nógv og støðugt arbeiði

- Ein stórur trupuleiki hjá Føroysku flakavinnuni, er ójøvn rávøru tilgongd, sigur Símun P. Jacobsen á Føroya Fiskavirking.

Hann nevnir sum dømi, at í 2002 vórðu 120.000 tons av botnfiski fiskað undir Føroyum, men í fjør er ikki talan um meiri enn eini 80.000 tons.

Men umframt stórar broytingar frá ári til ár, eru eisini sera stóra í einum ári.

- Fyrra hálvár er vanliga nóg mikið - ella kanska ovmikið - av fiski til, meðan tað seinna hálvár er alt ov lítið til.

Hann sigur, at hetta ger tað sera tórført at leggja eina virkisætlan til rættis, samstundis sum tað er torført at gera fastar sáttmálar uppá liðugvøru.

Frysta rávøran hevur tann fyrimun, at tú avgert sjálvur, nær hon skal framleiðast. Hartil er góðskan javnari tí fiskurin verður frystur umborð, minn enn átta tímar eftir at hann er fiskaður og á virkinum verður hann tiðnaður í 12-16 tímar.

- So tilsamans er fiskurin minni enn eitt samdøgur gamal, tá ið hann verður framleiddur á einum virki og somuleiðis er liðugtvøran kend og góðtikin á marknaðinum, sigur Jógvan Gregersen.

Men skal frystur fiskur innflytast til virkingar á virkjunum kring landið, kostar tað eyka í farmagjaldi at flyta hann til Føroyar.

Og er harafturat talan um triðjalandsfisk, skal eisini tollur betalast av lidnu vøruni, verður hon flutt til ES.

Fyri flak er talan um toll, sum runt roknað er tríggjar krónur fyri kilo av teirri lidnu vøruni.

- Men tá ið vit, longu áðrenn vit byrja framleiðsluna, vita, at vit eru tríggjar krónur fyri kilo verri fyri enn okkara kappingarneytar, er tað óhugsandi, at vit kunnu fáa nakra gongd á virksemi við frystari rávøru, sigur Símun P. Jacobsen.

Jógvan Gregersen á Vaðhorn sigur, at verða umstøður at taka táttin upp aftur at virka innfluttan, frystan fisk í Føroyum, saman við feskum fiski frá føroyskum skipum, kunnu virkini hava javnari arbeiði, so at arbeiðsfólkið fær javnt sínar 40 tíma viku, og virkini fáa størri nøgdir og sostatt størri avkast.



*At innflyta frystan fisk, er stór vinna í okkara grannalondum, men í Føroyum ber tað ikki til, fyrrenn landið spælir við, siga framleiðarar*

# Føroyingar missa eina stóra vinnu av hondum

FISKAARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Framleiðsla úr frystum ráfiski er ein stór vinna rundan um okkum, sigur Jógvan Gregersen á Vaðhorn á Strondum. Hann nevnir, at í Noregi er stór framleiðsla av saltfiski og klippfiski.

Og í Danmark eru tvey saltfiskavirki sum framleiða 10.000-15000 tons um árið burtur úr innfluttum, frystum fiski, serliga burtur úr alaskatoski, sum er triðjalandsfiskur í Føroyum.

Í Týsklandi er eitt saltfiskavirki, sum framleiðir úr frystum.

Frystur toskur úr Grønlandi er eisini triðjalandsfiskur hjá okkum, hóast vit eru í sama ríki og Russland er stórur leverandørur av toski bæði til Norra og Kina, sum so aftur endar sum liðugtvøra í ES.

### Fleiri avtalur

Í løtuni hava vit kumuleringsavtalu við ES um fisk úr Noregi og Íslandi, so hann kann flytast til Føroya, virkast her, og útflytast á marknaðin í ES sum føroyskur upprunafiskur.

Í hesum føri er farmagjaldið at fáa rávøruna til Føroya einasti munurin á føroyskum, íslendskum og norskum framleiðarin.

- Tá kappast vit á jøvnum føti og er talan um javnbjóðis kapping, standa føroyingar seg í kappingini, sigur Jógvan Gregersen á Vaðhorn.

Men verður frystur fiskur fluttur úr øðrum londum enn Íslandi og Noregi og virkaður á føroyskum virkjum, kann tann lidna vøran ikki flytast á ES marknaðin, uttan at koma undir rættiligan høgan toll.

Hett er tað, ið verður nevnt triðjalandsfiskur.

Til dømis er tollurin á flaktum saltfiski 11% og tollurin á saltflaki er 16%, tá ið vøran er virkað úr fiski frá triðjalondum.

Tollurin verður roknaður av teirri lidnu vøruni og her kann tað snúgva seg um einar 5,50 krónur fyri kilo av flaktum saltfiski og einar átta krónur fyri saltflak.

Hetta svarar til einar tríggjar krónur fyri kilo av ráfisik fyri flaktan saltfisk og 4,50 fyri kilo av ráfiski, tá ið tað kemur til saltflak.

- Tað er hetta óhugsandi at fara í holt við, tí tollurin verður høgdi enn skiftisavlopi, sigur Jógvan Gregersen.

Fyri flak er tollurin eini 7,5% av liðugtvøruni, sum í rundum tølum svarar til áleið tríggjar krónur fyri kilo ella 1,50% fyri hvørt kilo av ráfiski.

Jógvan Gregersen heldur tískil, at tað átti eisini at verið ein politisk uppgáva at fingið líknandi avtalur um fisk úr fleiri londum, tí føroyskir fiskakeyparar fáa javnan tilboð um at keypa fisk úr Russlandi, Alaska og úr Grønlandi.

- Tað hevði verið ein øgiligur fyrimunur, leggur hann afturat.